Bjørn á Heygum:

# Eftirlit við SEV-monopolinum er alneyðugt

**- Tað er neyðugt, at tað almenna hevur eftirlit við sáttmálum hjá eini monopolfyritøku sum SEV, tí at ein slík fyritøka nýtist ikki at vera eins varin við útreiðslunum og ein fyritøka, ið virkar undir marknaðarbúskaparligum treytum, sigur Bjørn á Heygum, advokatur**

Sáttmálatræta
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Nú er aftur galið í samráðingunum millum SEV og Maskinmeistarafelagið, eftir at landsstýrið fyri aðru ferð innan tvey ár hevur vrakað ein sáttmála millum partarnar.

Bjørn á Heygum, advokatur, sigur, at eftirlitið, sum landsstýrið hevur á hesum økinum er neyðugt.

- Eg skilji væl, at tað almenna tekur fyrilit fyri slíkum sáttmálum, ið verða skrivaðir av einum interkommunalum felagsskapi, hóast eg ikki taki undir við tí samráðingarstøðu, sum SEV og Maskinmeistarafelagið samráðast undir.

Bjørn á Heygum vísir á tað støðu, ið SEV hevur sum einasti el-veitari á tí føroyska marknaðinum.

- Hetta er ein serlig støða, har SEV sum ein monopolfyritøka ikki samráðist undir teimum treytum sum t.d. tað privata vinnulívið ger. Ein privat fyritøka kann nevniliga altíð bera hækkaðar lønarútreiðslur víðari yvir á brúkaran at gjalda, sigur Bjørn á Heygum.

Tí heldur hann, at tað er neyðugt frá almennari síðu at hava eftirlit við almennum monopol-fyritøkum. Útreiðslustøðið hjá slíkum felagsskapum og fyritøkum er vanliga hægri enn hjá øðrum líknandi fyritøkum, og tí nýtist teimum ikki at vera eins varin á útreiðslusíðuni.

Orsøkin til at landsstýrið hevur fingið ein veto-rætt í kommunustýrislógini í sambandi við slíkar sáttmálar er, at SEV er ein interkommunalur felagsskapur og harvið ein almennur stovnur, ið landsstýrið varar av.

- Tað er alneyðugt við einum slíkum eftirliti, men tað skuldi møguliga verið framt í verki gjøgnum aðrar mannagongdir, so at vit ikki uppliva hesa støðuna aftur og aftur, sigur Bjørn á Heygum.

### Vantandi samskifti

Bjørn á Heygum heldur, at SEV sleppur ov lætt at hækka lønirnar hjá maskinmeistarunum uttan at taka onnur fyrilit.

- Samskiftið millum SEV og Fíggjarmálaráðið burdi verið betri, og hesar samráðingarnar hava eisini víst eina vantandi kenslu av, hvat er møguligt í hesum sáttmálanum. SEV kann als ikki forsvara, at teir halda fram við at samráðast á henda hátt, sigur Bjørn á Heygum.

- Undir øllum samráðingum er tað ein grundleggjandi fortreyt, at samráðingarnevndirnar eru suverenar og kunnu taka endaligar avgerðir ístaðinfyri at skriva undir sáttmálar við fyrivarni. Tað er ein keðilig støða, at vit hava ein triðja part, ið ikki tekur lut í samráðingunum, tí sjálvandi er tað betri, at tann parturin, ið hevur síðsta orðið, er við í samráðingunum, sigur Bjørn á Heygum, sum harvið mælir landsstýrinum til at taka lut í samráðingunum, so at eitt møguligt úrslit altíð var endaligt.

- Vit kunnu seta eitt stórt spurnartekin við, um hetta er talan um realitetssamráðingar, tá almenni eftirlitsmyndugleikin ikki er við. Úrslitið er jú viriðsleyst, sigur Bjørn á Heygum.

*- Undir øllum samráðingum er tað ein grundleggjandi fortreyt, at samráðingarnevndirnar eru suverenar og kunnu taka endaligar avgerðir ístaðinfyri at skriva undir sáttmálar við fyrivarni, sigur Bjørn á Heygum*

*Savnsmynd*



---

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur:

# Ein ósiður at samráðast uttan heimild



*- Tað gevur púrt onga meining at samráðast undir slíkum treytum. Bárður Nielsen skuldi verið komin uppí leikin beinanvegin. Alt annað er tekin um óveruligar samráðingar, sigur Jógvan Mørkøre um støðuna millum SEV, Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið*

*Savnsmynd*

**Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og fyrrverandi fakfelagsformaður hjá Yrkisfelagnum, skilir ikki, at Maskinmeistarafelagið góðtekur at samráðast undir verandi umstøðum**

Sáttmálatræta
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

- Tað gevur púrt onga meining at samráðast undir slíkum treytum. Bárður Nielsen skuldi verið komin uppí leikin beinanvegin. Alt annað er tekin um óveruligar samráðingar, sigur Jógvan Mørkøre um støðuna millum SEV, Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Hann leggur ikki fingrarnar ímillum, tá hann skal lýsa leiklutin hjá landsstýrinum í hesum máli.

- Landsstýrið sum arbeiðsgevari má heilt einfalt taka annað skinn um bak, tí hetta er at halda mótparin fyri tað turra spott, sigur Jógvan Mørkøre.

### Vantandi skipan

Hann heldur harumframt, at verandi støða er eitt tekin um vantandi skipan á arbeiðsmarknaðinum.

- Ein fortreyt fyri einum vælvirkandi arbeiðsmarknaði er, at samráðingar fara fram undir skipaðum viðurskiftum, og at talan er um veruligar samráðingar. Tann, sum situr við samráðingarborðið, má hava fult mandat til at taka avgerðir, ella má tann, sum gevur mandatið, vera við undir samráðingunum, sigur Jógvan Mørkøre.

Hann sigur seg minnast frá samráðingum fyri fleiri árum síðani, har hann sjálvur sat við samráðingarborðið, at ein ávísur landsstýrismaður samráddist við fyrivarni fyri, hvat løgmaður møguliga fór at siga um úrslitið.

- Tá bóðu vit um at fáa løgmann til samráðingarborðið, so at samráðingarnar kundu fara fram á einum veruligum grundarlagi, sigur Jógvan Mørkøre. Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, heitti fleiri ferðir á SEV um at fáa umboð úr Fíggjarmálaráðnum til samráðingarborðið, men hesum sýtti landsstýrismaðurin fyri.

- Hetta er ein undarlig konstruktión. Fíggjarmálaráðið er ikki við til samráðingar, men kunnu kolldøma eitt samráðingarúrslit, tá tað fyriliggur. Hendan konstruktión ger tað vónleyst at fáa ein vælvirkandi arbeiðsmarknað og enn minni ein góðan samráðingaranda, sigur Jógvan Mørkøre.

### Marknaðurin ger av

Jógvan Mørkøre er ikki samdur við tí, sum Bjørn á Heygum sigur aðrastaðni á hesi síðuni, at sáttmálin ikki er vorðin til undir marknaðarbúskaparligum treytum.

- Hetta er tað, sum marknaðurin saman við semingsfólki er komin fram til, sigur Jógvan Mørkøre, hóast SEV er einasti elveitari í Føroyum og harvið hevur monopol á marknaðinum.

Hann skilir tí ikki grundgevingarnar hjá Bárði Nielsen um, at hesin sáttmálin fer at vera grundarlagið undir komandi samráðingum á almenna arbeiðsmarknaðinum, tá ein og hvør partur fer til samráðingar undir teimum treytum, ið arbeiðsmarknaðurin setir.

Hann vísir eisini á vandan í tí, at samráðingarrætturin er burtur, tá allir slíkir sáttmálar skulu góðkennast av tí politiska myndugleikanum.